# Hermundi Michelsen til minnis

Hin seinasti er farin av teim trimum, ið vórðu settir sum økisleiðarir at taka sær av landsvegakervinum, sum fyrsta apríl 1964 varð lagt undir Landsverkfrøðingin. Heitt varð á Niels Paula Hansen á Glyvrum um at umsita vegirnar í Eysturoynni, Hermund Michelsen í Suðuroynni og Hans Dalsgarð í hinum oyggjunum, øllum uttan Streymoynni, íð varð umsitin beinleiðis av Lv-skrivstovuni í Havn.

Áður høvdu vegirnir ligið undir kommununum, og arbeiðið undir nøggju skipanini fór fram í tøttum samarbeiði við teir, sum til ta tíð høvdu haft hetta um hendi. Teir hildu flest allir fram og seinni gjørdust seks teirra økisleiðarar, tá økini gjørdust fleiri.

Av hesum níggju økisleiðarum eru sjey ikki longur okkara millum.

At hetta mest sum av sær sjálvum gerst eitt petti av Føroya vegasøgu kemst av, at mær eydnaðist at fáa eina bandaða samrøðu við Hermund, har hann - hóast eg sjálvur kendi nógv aftur - bæði fyri eygum og oyrum mínum myndaði stóra lopið úr miðaldarháttaðum arbeiðislagi, tá hann var óviti, og upp til teir hentleikar, sum komnir vóru upp til henda dagin í oktober 1985.

Útstinging eftir frægasta handahógv uttan tól, vegagerð við haka og grótleypi, boring við hondbori og sleggju, har hegni og vøddamegi vóru álitið. Fyri at áskotið skjótari skuldi festast, varð førasti maðurin settur at treða dansin, um ein so kann siga, fram eftir vegnum, sum tó kortini mátti steingjast fyri ferðslu í toybili og áarføri.

Hermund var sum flest allir føroyingar eitt skifti til skips, men fór í 1952/53 á búnaðarskúla í Danmark, har hann m.a. lærdi uppmáting, íð kom honum til góðar í vegagerðini, sum hann inn ímillum fekst við í Suðuroynni og tá hann 20. sept 1956 gjørdist fastur fúsur á Hovsvegnum, har hann í fyrstuni koyrdi traktor og var spreingimeistari, áðrenn hann fór at máta upp og stinga út. Jógvan á Lað var tá leiðari av vegadeildini hjá Landsverkfrøðinginum og hevur sæð dygd í manninum, tí tá Hovsvegurin í 1958 var liðugur, varð Hermund biðin sum fastløntur norður á Nato-vegin, har hann frá januar 1959 stakk út frá Gamlaenda og norðureftir, heilt niðan undir Sornfelli. Teir húsaðust hesa tíðina í Mjørkadali, einir tjúgu mans í hvørjari tíggjumansbarakk. Í 1961 var hann við til at máta upp, prosjektera og stinga út á Hósvíkarvegnum, og sama árið varð farið undir Oyggjarvegin úr Kollafjarðardali móti Skeiðsá og umbygging úr Havn og niðan á Gamlaenda. Sum hegnismaður við nevnda kunnleika vóru innímillum ofta boð eftir honum í onnur pláss, eitt nú í 1962/63 at hjálpa Gamla Kristjanni suðuri á Dalsvegnum og á Gjáar- og Funningsvegnum.

Hvør frásøgnin frá hesum arbeiðum liggur eftir Hermund sum ein søgulig, forvitnislig og oftast skemtilig heild.

Innan føroyska vegagerð var Hermund ein av pionerunum, sum altið var hyggin í ráðum, tá okkurt stakk seg upp, sum ikki beinleiðis eftir bókunum kundi loysast. Sama var, tá minnið okkara norðanfjørðs ikki røkk. So var bara at ringja suður til Hermund, sum mangan sambært gamla siðvenjing uttan øvugt orð dugdi loysa fløktasta ognarspurning.

Her verður ikki nomið við fjølbroytta virkið hjá Hermundi annars, eitt nú sum nútímans bóndi við víðum hugflogi og mennandi tjóskaparligum hugsjónum í politikki, og sum álitismaður fekk hann lívið langt úr at gera í ymiskum - til tíðir sera krevjandi og tyngjandi - nevndararbeiði.

Um tað var heima hjá foreldrum Hermunds, minnist eg ikki; men tá vit í 1965 hittust, kendi eg í heiminum hjá Jastrid og Hermundi sama fløvan aftur frá árunum undir krígnum, tá eg var so heppin at sleppa at ganga í preliminærskúla har suðuri, og annan hvønn dag ella so í fyra ár súklaði av Tanganum og til Øravíkar at keypa mjólk. Eg gloymi ikki mjólksopan og bitan afturvið, eg fekk frá bóndafólkunum, áðrenn leiðin aftur gekk inn í Treingisvág.



*myndin er tikin fráfaringardag Hermunds stutt fyri jól, 2001*

Hóast høvið henda illveðursdagin var merkt av sorg, tá vit í longstu bilarøð, eg í Føroyum havi sæð, mest sum í heiðursskrúðgongu kring allan fjørðin fylgdu Hermundi til hansara seinasta hvíldarstað, so kendist løtan aftaná kortini hugnalig kring búgvið borð í gomlu bóndahúsunum í søguligu Øravík.

Í samkenslu við Jastrid og øllum teirra, lðsa gomlu starvsfelagarnir við hesum frið yvir minni Hermunds.

**Heini Olsen**

# 68. bind av Varðanum komið

**Nú 100 ár eru liðin síðan Heðin Brú varð borin í heim, fer Varðin eisini at minnast hann. Heðin Brú skrivaði nógv í Varðan**

BÓKAÚTGÁVA

*Tíðindaskriv*

**Heðin Brú:** Fyrsta grein hansara í Varðanum var stuttsøgan Høgni hin Gamli. Hon stóð í 9. bindi. Hanus A. Samuelsen skrivar grein um skaldið.

Hanna Absalonsen hevur greitt til prentingar brot úr brøvum frá Heðin Brú til Chr. Matras.

Magnus Brahé Jørgensen hevur 2. part av greinarøð síni um Føroya kirkjusøgu. Sverri Djurhuus, sum fyri nøkrum árum síðani skrivaði í Varðan um barnaárini í Kollafirði, hevur hesa ferð grein, sum hann nevnir Ungdómsárini.

Bergur Hansen skrivar drúgva grein um Selmu Lagerløf, og Tórður Johannesarson hevur grein, sum hann nevnir Táttaskaldskapur við Sjógv, á Miðgerði og í Líð í Kollafirði.

Tvær greinir eru um ættarsøgu: Egon Hansen skrivar um fólkini á Mýrini í Nólsoy, og Freydis Poulsen hevur seinna part av grein síni Ættargrein av Blankskála.

Hjalmar P. Petersen hevur eina ritgerð um ævintýrkvæðið Fípuna Føgru.

”Langt av leið frá ljósum borgum mjørkafjalt mítt ungdómsmið, niðanátt og dapur morgun, ørm mín sál og uttan frið” yrkti Janus Djurhuus í 1914.

Bókmentafrøðingurin Kim Simonsen hevur skrivað drúgva grein, sum hann nevnir Hin føroyska útlegdin – um útlegd, útisetar og tey intellektuellu.

Í 1935 og 1936 gjørdu føroyingar fiskiroyndir í Grønlandi við skonnartini Artic. Um hetta skrivar Erling Isholm.

Poul Vestergaard hevur greinina Brúgvin til himmals – bandið til jarðar, har hann viðger sálmarnar ”Tú fylgdi mær fyrst, tá í vøggu eg lá” eftir Mikkjal á Ryggi og ”Móðurland vil eg teg kalla – føðilandið mítt” eftir Jóannes Patursson.

Nicodemus Rasmussen, sum eftir pensiónsaldur rættiliga fór í holt við at kanna gamalt skjalatilfar og skriva av gamlar søgukeldur, hevur brot úr vártingbókini fyri Eysturoy árini 1697 – 98.

Seinast hevur Heini Olsen minnisgrein um skyldmann sín mentamannin Sverra Eghom, sum doyði fyri einum ári síðani.

Varðin 68. bind, sum er 232 síður til støddar, kostar 195 krónur í bókabúðunum. Haldaragjaldið er 140 kr. um árið.




# ítróttur

Nr. 11 • hósdagur • 17. januar 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

KIF – Tjaldur 24-27 (14-16)

## Tjaldur tekur seg úr botninum



*Tjaldur vann týskvøldið dystin móti KÍF í Vestmanna. Bæði liðini mansvardu hvør sín leikara, og málverjin hjá Tjaldri var ein av lyklaspælarunum*

*Savnsmynd: Álvur Haraldsen*

**Liðið úr Runavík vann týskvøldið dystin í Vestmanna móti KÍF. Tjaldur legði seg framum heilt frá byrjan og megnaði at varðveita leiðsluna alla tíðina. Við sigrinum hevur Tjaldur tikið seg úr botninum í 1. deild hjá monnum**

HONDBÓLTUR

*Stefan í Skorini*

Tjaldur legði hart út í dystinum móti KÍF í Vestmanna týskvøldið, og tað var tann framúr góða byrjanin, ið vann teimum dystin og tvey týdningarmikil stig. Tjaldur hevur nú lagt sjógv ímillum seg tey bæði botnliðini, KÍF og Kyndil.

Eftir fimm minuttir hevði Tjaldur skotið fýra mál og kollfirðingar einki. Gestirnir megnaðu at halda fast um hesa leiðslu heilt til dystarenda. KÍF elti Tjaldur allan dystin, men legði at enda árarnar inn.

KÍF nærkaðist onkuntíð Tjaldri, men ongantíð nærri enn eitt mál frá gestunum.

Bæði liðini høvdu eina greiða ætlan, sum skuldi vera lykilin til sigurin. Henda ætlan var mansverjing. Runavíkingar vistu undan dystinum, at um teir skuldu gera sær vónir um at vinna, var alneyðugt at steðga tí skotsterka Iljan Topic. Tí settu teir Sverra Justinussen at ansa eftir tí fremmanda leikaranum, sum hevur hjálpt KÍF til nøkur góð úrslit í ár.

KÍF svaraði aftur við at mansverja Sverra Justinussen, sum gjørdist toppskjútti hjá Tjaldri týskvøldið. Av tí at Sverri mansvardi Topic fekk hann fleiri mál eftir kontraálop, tí hann slapp skjótt niðaneftir vøllinum.

Hóast Sverri varð mansvardur skeyt hann átta mál. Tað eydnaðist tí ikki KÍF at steðga Sverra, sum ikki hevur víst sítt besta spæl higartil í hesum kappingarárinum. Hesin dysturin bendir tó á, at hann hevur funnið sítt besta spæl, sum einaferð gav honum landsliðsboð, framaftur.

Tað hevur annars verið vanligt, at móstøðulið hjá Tjaldri mansverja Dragisa Stojovic, sum er ein skotsterkur leikari og toppskjútti hjá Tjaldri samanlagt. Hann var annars ikki serliga væl upplagdur til hendan dystin.

Tað eydnaðist hinvegin væl hjá Tjaldri at mansverja Topic. Hann fekk bara fýra mál, og hann fær vanliga fleiri enn hetta.

### Málverji avgerandi

Sagt verður um dystin í Vestmanna, at bæði liðini mistu nógvar óneyðugar bóltar. Dysturin gjørdist tí heldur rokmikil og óskipaður.

Ein avgerandi orsøk til sigurin hjá Tjaldri var stórspæl frá málverjanum Dean Lacok. Hann stóð hampuliga væl í fyrra hálvleiki, tá hann tók okkurt brotskast, men í seinna hálvleiki var hann framúrskarandi.

Hann tók fleiri skot og bjargaði eftir fríspælingar. Hann bjargaði liði sínum í fleiri umførum, tá liðfelagarnir ikki megnaðu at verja, ella tá teir mistu óneyðugar bóltar.

Mortan Hansen á strikuni hjá Tjaldri spældi eisini væl, og hann fekk fleiri mál.

Hetta er triðji dysturin millum hesi bæði liðini, og Tjaldur hevur nú vunnið tveir, og ein endaði við javnleiki.

**Dysturin í tølum:**

**KÍF – Tjaldur 24-27 (14-16)**

Málskjúttar:

KÍF: Eddie Joensen 9, Durica Tomic 6, Iljan Topic 4, Petur M. Poulsen 3, Vagnur Johannesne 1, Finn Heri Johannesen 1

Tjaldur: Sverri Justinussen 8, Mortan Hansen 5, Zoran Sarcevic 4, Ken Bærentsen 3, Jens Martin Knudsen 3, Hartvig Joensen 2, Dragisa Stojovic 2

Brotskøst: KÍF 4, Tjaldur 3

Útvísingar: KÍF 3, Tjaldur 3

Dómarar úr Kyndli: Hannis Wardum og Rúni Mohr

## 1. Deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 2 | 2 - 0 - 0 | 408 | 339 | 69 | 15 |
| 2 | Neistin | 2 | 2 - 0 - 0 | 442 | 363 | 79 | 14 |
| 3 | StÍF | 1 | 1 - 0 - 0 | 363 | 346 | 17 | 8 |
| 4 | H71 | 2 | 0 - 0 - 2 | 384 | 409 | -25 | 6 |
| 5 | Tjaldur | 2 | 1 - 0 - 1 | 342 | 384 | -42 | 6 |
| 6 | KÍF | 3 | 0 - 0 - 3 | 393 | 438 | -45 | 4 |
| 7 | Kyndil | 2 | 1 - 0 - 1 | 320 | 373 | -53 | 4 |

## Máltindurin:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Bjarni Wardum | H71 | 96 | (22) |
| Jacob Jónsson | Neistin | 95 | (13) |
| Costin Dumitrescu | StÍF | 89 | (26) |
| Heini Joensen | Neistin | 86 | (25) |
| Høgni Klein | Kyndil | 85 | (6) |
| Durica Tomic | KÍF | 81 | (21) |
| Halgir Dahl Olesen | H71 | 80 | (10) |
| Dragisa Stojovic | Tjaldur | 77 | |
| Iljan Topic | KÍF | 76 | |
| Finnur Hansson | H71 | 76 | (20) |
| Ingi Olsen | VÍF | 74 | (8) |
| Sámal Joensen | VÍF | 72 | (13) |
| Áki Olsen | VÍF | 70 | (10) |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Neistin | 65 | (6) |
| John Petersen | Neistin | 64 | (1) |

## Julian á beinkinum tá Hull tapti

FÓTBÓLTUR

*Stefan í Skorini*

Tað gongur illa í hond hjá Julian Johnsson og liðfeløgum hansara í Hull City. Týskvøldið tapti liðið 1-0 á heimavølli móti Carlisle, sum liggur í botninum. Hetta var fjórði ósigurin á rað hjá Juliani og teimum, sum ikki hava vunnið í seinastu sjey dystunum.

Carlisle skoraði einasta málið tíðliga í dystinum. Hull legði hart trýst á Carlisle í seinna hálvleiki, men útiliðið megnaði at halda málið reint. Julian varð settur inn eftir 62 minuttir, tá venjarin framdi tríggjar útskiftingar.

Hull hevur annars staðið seg ómetaliga væl á heimavølli, og liðið hevði undan dystinum ikki tapt á egnum grasi í eitt heilt ár.

Hull er komið í ein rættuligan aldudal og hevur tapt fýra teir seinastu dystirnar. Liðið hevur ikki vunnið ein dyst síðan 4. desember.

Avleiðingin er, at Hull nú er dottið burtur ímillum í oddastríðnum. Liðið liggur í løtuni á sætta plássi. Hetta gevur framvegis atgongd til uppflytingardystir, og Hull hevur tískil framvegis góðar møguleikar at vinna uppflyting.